# Bach-tónleikur í Fuglafirði og í Havn



Um vikuskiftið skipar Havnarkórið fyri tveimum framførslum av tónleiki eftir J. S. Bach. Tann fyrra verður í Fuglafjarðar Kirkju leygarkvøldið 20. november kl. 19.00 og tann seinna í Vesturkirkjuni sunnudagin kl. 16.00.

Lagt verður fyri við “Der Geist hilft unsrer Schwachheit auf”, sum er ein av teim sjey motettunum hjá Bach. Hesar motettir eru krevjandi kórtónaverk, og tað serstaka við hesari er, at kórið í byrjandi høvuðspartinum er býtt í tveir partar við sínámillum sangligum samskifti.

Næst á skránni framførir Jógvan Thomsen gitnu Toccata og fuga í d-moll. Tað var við hesum megnarverki, at tann blaðungi nólsingurin, Jógvan, á fyrsta sinni gjørdi vart við sínar serstøku tónleikagávur.

Síðan verður kamartónleikur at hoyra: Teir tríggir Nikolas Kapnas (fiól), Jørgen Skyttegaard (obo) og Tóri Restorff Jacobsen (cello) fara at spæla tveir satsir úr Trio í G-dur, og eftir tað spæla allir strúkarnir ta yndisligu “Air” úr Suitu nr. 3.

Konsertin endar við Magnificat. Hetta verk fyri kór, soli og orkestur er at meta sum eitt av aðalverkum Bachs saman við Matteus Passiónini, Jóhannes Passiónini, H-moll Messuni og Jólaoratoriinum.

Magnificat er tó munandi stytri í vavi enn hini, meira konsentrerað, hevur ikki í sær nakra bíbilska søgugongd, men er bygt upp mest av máttmiklum kórsatsum við einstøkum arium inníimillum, har øll, hvør á sín hátt, lýsa fagnaðin yvir boðanina um tann komandi frelsaran.

Havnarkórið hevur kórlutin, orkestrið er sett saman til høvið av musikklærarum og –næmingum við Nikolas Kapnas sum konsertmeistara, og teir fýra solistarnir eru øll føringar, ið koma uttanlendis:

Elsa Súsanna Dalsgaard, alt, og Ernst Sondum Dalsgarð, tenorur, eru gamlir kenningar og samstarvarar hjá Havnarkórinum. Bæði eru teyprofessionelt virkin innan operuheimin ávikavist í Oslo og í Keypmannahavn.

Drífa Hansen, sopran, og Herfinnur Árnafjall, bassbariton, fingu sítt fyrsta sangliga støði í førisku sangskúlaroyndini nøkur ár herfyri, hildu fram á Sangskúlanum í Reykjavík og eru nú bæði tónleikalesandi í Týsklandi – hon í Berlin og hann í Nürnberg. Stjórnandi leiðari er Ólavur Hátún.








**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## Í MORGIN




Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, seinnapartin minni vindur av eystri. Sólglottar, men kanska okkurt ælið og hitin millum 3 og 6 stig.

## SUNNU- OG MÁNADAGIN




Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 0 og 4 stig.

## TÝS- OG MIKUDAGIN




Lot til andøvsgul av landnyrðingi, mikudagin frískar hann vindin av norði. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 0 og +4 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðsti nátt::**
Eitt lágtrýst, 989 hPa. í útsynning vestan úr Føroyum stendur mestsum í stað og grynnist.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið sunnan fyri island grynnist framvegis. Hátrýstryggurin eystanfyri Grønland gevur sum frálíður gott høgættaveður á okkara leiðum.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 127 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

13. nov Fyrra kvarter
15. nov Mánin longst frá jørðini
21. nov Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. nov | 04:22 | 16:42 | 03:22 | 15:42 | 03:37 | 15:57 | 06:22 | 18:42 | 07:22 | 19:42 | 02:37 | 14:57 | 01:37 | 13:57 | 04:37 | 16:57 | 05:37 | 17:57 | 04:07 | 16:27 | 05:22 | 17:42 |
| 20. nov | 05:03 | 17:25 | 04:03 | 16:25 | 04:18 | 16:40 | 07:03 | 19:25 | 08:03 | 20:25 | 03:18 | 15:40 | 02:18 | 14:40 | 05:18 | 17:40 | 06:18 | 18:40 | 04:48 | 17:10 | 06:03 | 18:25 |
| 21. nov | 05:48 | 18:09 | 04:48 | 17:09 | 05:03 | 17:24 | 07:48 | 20:09 | 08:48 | 21:09 | 04:03 | 16:24 | 03:03 | 15:24 | 06:03 | 18:24 | 07:03 | 19:24 | 05:33 | 17:54 | 06:48 | 19:09 |
| 22. nov | 06:31 | 18:56 | 05:31 | 17:56 | 05:46 | 18:11 | 08:31 | 20:56 | 09:31 | 21:56 | 04:46 | 17:11 | 03:46 | 16:11 | 06:46 | 19:11 | 07:46 | 20:11 | 06:16 | 18:41 | 07:31 | 19:56 |
| 23. nov | 07:21 | 19:46 | 06:21 | 18:46 | 06:36 | 19:01 | 09:21 | 21:46 | 10:21 | 22:46 | 05:36 | 18:01 | 04:36 | 17:01 | 07:36 | 20:01 | 08:36 | 21:01 | 07:06 | 19:31 | 08:21 | 20:46 |